# Villi laksurin í vanda

**Við verandi gongd er vandi fyri, at villi laksurin fer at doyggja út í Noregi**

LAKSUR

*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Minni og minni av villum laksi er at síggja í teimum norsku áunum, og norska deildin hjá World Wildlife Foundation sigur seg nú bera ótta fyri, at tann villi laksurin fer at doyggja út. Í einari nýggjari frágreiðing hjá felagsskapinum stendur millum annað, at kanningar í 200 norskum áum vísa, at har er tann villi laksurin minkaður so nógv, at tað kann benda á, at hann er um at doyggja út.

– Hetta er ein ræðandi gongd, sum vit mugu taka í størsta álvara, sigur fiskivinnuráðgevin hjá WWF, Maren Esmark, við blaðið VG. Hon heldur, at tað eru serliga dálking, vatnorkuútbyggingar og laksaparasittурin Gyrodactylus salaris, sum hótta tann villa laksin.

Jarle Steinkjer, sum starvast í norska stýrinum fyri náttúruumsiting, stúrir eisini fyri gongdina við tí villa laksinum. Hann sigur við VG, at tað eru fleiri ár, síðani minkingin byrjaði, men at nú er stovnurin vorðin so lítil, at okkurt má gerast.

## Minni sleppur út

Í sambandi við trupulleikarnar hjá tí villa laksinum hevur ofta verið víst á, at alt ov nógvur alilaksur sleppur úr ringunum, og at tað er óheppið fyri tann villa laksin. Tey seinastu árini hava norðmenn lagt stóran dent á at forða fyri, at aldur laskur skal rýma úr ringunum, og hetta arbeiðið vísir seg nú at geva úrslit.

Sambært norska alarafelagnum hava alararnir mist 247.000 fiskar higartil í ár, og tað er nógv minni enn fyrra hálvár í fjør, tá umleið 800.000 fiskar sluppu til rýmingar úr alibrúkunum.

Av teimum 247.000 alifiskunum, sum eru slopnir til rýmingar í ár, vóru 32.000 laksar. 165.000 síl og 77.000 toskar fóru eisini til stroks, sigur alarafelagið.

*Tað er millum annað ávirkan frá aldum laksi, sum kann forkoma tí villa laksinum*



# Ótolnast eftir oljuni

**Í Løgumkloster í Danmark ótolnast tey eftir, at oljan skal koma upp úr jørðini**

OLJA

*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Fyri tveimum árum síðani fekk oljufelagið Wexco rættindi til at útvinna olju í umráðnum við býin Løgumkloster í Suðurjútlandi. Men enn er eingin olja komin upp úr jørðini, og sambært JydskeVestkysten eru fólk á staðnum farin at ótolnast. Men tey eru ov ótolin, sigur Steffen Bjørn Olsen í Orkustýrinum við danska útvarpið.

– Hetta er púra vanligt í hesari vinnuni. Feløgini keypa seks ára loyvir, og tað er púra vanligt, at tey brúka tey fyrstu fýra árini til at kanna viðurskiftini á staðnum, áðrenn tey søkja um loyvi at bora, sigur Steffen Bjørn Olsen við DR.

Eitt felag, sum ætlar sær at leita eftir olju í Danmark, skal rinda tí almenna 25.000 krónur, áðrenn borurin verður settur í jørðina. Vísir tað seg so, at tað kann loysa seg at útvinna olju ella gass, skal felagið rinda ríksikassanum 100.000 krónur, áðrenn tann fyrsta oljan verður útvunnin, og harafturat skal ríkiskassin hava ein fastan part av tí árliga avlopinum.


M A R K N A Ð A R R Á K

VIKA 30 2007

### TÝDNINGARMIKLIR ROKNSKAPIR

Roknskaparkunngerðirnar halda fram. Í farnu viku komu nógv stór virkir roknskapinum fyri 2. ársfjórðing, til dømis Citigroup, Microsoft, IBM og Google. Ymiskt var hvussu roknskapirnir hilnaðust. Inntøkurnar hjá øllum hækkaðu, millum 15%-31% í mun til 2. ársfjórðing 2006. Hetta fekk kursin hjá Microsoft og IBM at hækka við ávikavist 2% og 4%. Marknaðurin var hinvegin eitt sindur vónsvikin av Google og Citigroup, sum lækkaðu ávikavist 5% og 1,5% eftir roknskaparkunngerðirnar.

Amerikanski marknaðurin lækkaði sum heild um 1% í farnu viku. Harvið bíða íleggjarar enn eftir onkrum, sum gevur eina sterka ábending um, hvønn veg marknaðurin skal komandi mánaðirnar. Vit meta, at marknaðurin fer at flyta seg aftur, tá flestu virkini hava kunngjørt roknskap. Higartil hava 143 av teimum 500 virkjunum í amerikanska vísitalinum S&P500 kunngjørt roknskap. Teir hava sum heild verið á leið sum væntað, og inntøkurnar eru í miðal 6% hægri enn 2. ársfjórðing í fjør. Eisini í Føroyum gera roknskaparkunngerðir um seg. Her kemur Eik við úrslitinum fyri 2. ársfjórðing hósdagin.

### GJALDOYRU FRIÐARLIG

Gjaldoyramarknaðurin hevur verið friðarligur, síðan dollarin viknaði niður um 5,44 mótvegis krónuni. Hann er nú 5,39.

### RENTURNAR LÆKKA

Lánsbrævamarknaðurin tók dik á seg í farnu viku. 10-ára rentan lækkaði úr 4,65% til 4,50%. Hetta merkir, at rentan nú er lækkað úr bandinum 4,58%-4,78%. Nú kunnu lægri rentur væntast. Tó við fyrivarni fyri, at summarmarknaðurin fær renturnar at sveiggja meir enn vanligt.

### HESA VIKUNA

Hesa vikuna verður framhaldandi mest fokus á roknskapirnar fyri 2. ársfjórðing. Eisini verða eyguni havd við høga oljuprísinum (79 $/tunnu), umframt gongdini á amerikanska bústaðarmarknaðinum.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1498,19 | -1,68% |
| Alheims partabrøv | 8866,11 | -0,75% |
| Atlantic Petroleum | 1140,00 | + 4,68% |
| Føroya Banki | 241,00 | + 4,33% |
| Eik | 725,00 | + 1,83% |
| KB Trygg Eurostoxx | 110,91 | -0,10% |
| USD | 538,92 | -0,25% |
| JPY | 4,45 | + 0,4% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK